# Norröna aftur í hóslag við bryggjukantin

**Tá Norröna hósdagin skuldi leggja at bryggju í Havn, tók vindurin skipið, so tað tørnaði heldur harðliga at fendaranum við bryggjukantin og fekk eina buglu í skrokkin**

NORRÖNA
*Edvard Joensen*



*Hósdagin kom Norröna so mikið harðliga at bryggju í Havn, at bugla kom í skrokkin*
Mynd: Jens Kristian Vang

Norröna og bryggjukantarnir í Havn tykjast ikki semjast væl. Serliga ikki, tá vindur er. Aftur hósdagin var ein samanbrestur, sum endað við eini buglu í skrokkinum á Norrönu.

Jógvan í Dávastovu, trygdarleiðari hjá Smyril Line, sigur, at tá skipið hevði vent inni í havnini og var á veg at bryggju inni við ferjuleguna, vaks vindurin og tók skipið heldur skjótari at bryggju, enn skiparin ætlaði. Síðan bresti heldur harðliga í fendaran, sum hongur við bryggjukantin, og skrokkurin bognaði. Spantið innan fyri bognaði eisini, men hol kom ikki á, sigur Jógvan í Dávastovu. Hann fór sjálvur umborð at hyggja at skaðanum, sum ikki er stórur, sigur hann.

Fólk frá Skipasmiðjuni kom umborð at umvæla skaðan á staðnum. Meira verður ikki gjørt við tað, sigur Jógvan í Dávastovu.

BP stjóri um oljufund:

# Tað sær spennandi út

**BP ætlar sær at halda og fremja sínar boriskyldur frá 1. Útbjóðing, áðrenn farið verður at hugsa um at fara upp í eina 2. Útbjóðing. Men tann møguleikin er so opin. Í løtuni tosar BP við oljufeløg og myndugleikar um at flyta sínar brunnar inn á basaltið. Stjórin í BP heldur annars, at seinasta fundið við markið er spennandi, men hann heldur vit skulu ikki leypa framav kortini**

OLJULEITING
*Jan Müller*



*Tá BP kom vælmannað til Føroya við umsóknunum, sum fevndu um heilar tríggjar brunnar*
Mynd Jan Müller

– Vit hava nakrar skyldur, sum vit ætla at avvikla, áðrenn vit fara víðari. Hetta sigur føroyski stjórin hjá BP, Hjarnar Djurhuus við Sosialin, tá vit spyrja hann, hví BP ikki er við í 2. útbjóðingarumfarinum á føroyska landgrunninum.

Hjarnar Djurhuus sigur, at tað hevur víst seg, at tað økið, 004, sum tey fingu tillutað og sum tey hildu var spennandi, var ikki so áhugavert kortini. Tí hevur verið samráðst við onnur oljufeløg, um man ikki saman kundi gera okkurt skilagott. Við hesum sipar oljustjórin til, at BP kann flyta sínar restandi tveir brunnar inn á okkurt av 9 ára loyvunum hjá øðrum oljufeløgunum.

Hesar samráðingar eru so eisini við føroyskar myndugleikar, tí teir skulu sjálvandi góðtaka alt leggur Hjarrnar Djurhuus aftrat.

Hann vísir tí á, at tað avgjørt heldur ikki er útilokað, at BP eisini seinni "farmar" inn tvs. fer saman við onkrum av hinum feløgunum, sum fáa tillutað leitiloyvi í 2. útbjóðingarumfari. Tað eru altið møguleikar fyri at "farma" inn. Og tað er sera vanligt aðrastaðni og tað bæði inn og út.

– Merkir hetta, at føroyingar ikki skulu taka tøgnina hjá BP sum ein manglandi áhuga fyri føroyska landgrunninum?

– Tað vil eg siga. Men vit hava skyldur, sum vit skulu halda, Og tær ætla vit at fáa frá hondini fyrst, og so taka vit støðu, hvussu víðari verður farið fram.

### Áhugavert

– Síggja tit ikki meira ljóst uppá framtíðar leiting á landgrunninum, nú tað er váttað, at tað er gjørt eitt stór fund hinumegin markið?

– Tað er greitt at finnur man nakað í nánd av tí føroyska markinum, so er tað altíð áhugavert. Tað, sum sjálvandi er serliga áhugavert, er tann vitan, sum vit vilja fáa, tá ið vit halda á fram við okkara skyldum sum so aftur kann virka saman við nýggjari vitan hjá øðrum, ið aftur kann koma øllum økinum til góða.

Hjarnar Djurhuus sigur, at vit sjálvandi mugu taka slík tíðindi við fyrivarni, tí man veit jú ikki, hvat veruliga kemur burtur úr, fyrr enn teir neyðugu avmarkingarbrunnarnir eru boraðir og kanningar gjørdar. Hann sipar her til tíðindini um Marjunfundið, tá menn eisini hildu, at vit skulu ikki leypa framav. Og so hevur ikki verið so nógv at hoyra til tað síðani. Men kortini heldur hann hetta vera sera áhugaverd tíðindi fyri Føroyaøkið. Hetta er jú sera tætt føroyskum øki sum úr Havnini til Skálhøvda. So tað er rættuliga nær við markið. So er hetta positivt er greitt, at taðv erður meira áhugavert at halda áfram á økinum.

Flyta brunnar til 9 ára loyvi

Í 1. útbjóðingini buðu oljufeløg sær til at bora tilsamans 8 brunnar. 4 eru boraðir og teir ífesta ndi 4 brunnarnir skulu borast í seinasta lagi í 2006. Eftir vánligu og løku úrslitini av boringinunum í tí sokallaða Gullhorninum hava feløgini, sum skulu bora ífestandi brunnarnar , sagt frá, at har er lítið at fara eftir í økinum og hava harvið givið ta signal, at tey heldur síggja, at brunnarnir verða boraðir aðrastaðni á landgrunninum

Sosialurin skilur, at samráðingar hav a og eru millum feløgini sínamillum at flyta brunnar í onnur loyvi og at myndugleikarnir eiisini eru við í hesum samráðingum.

Støðan er so tann, at Statoil hevur eitt 9 ára loyvi, har tað kann hugsast, at tað kann flyta sín brunn. Her er talan um eitt spennandi prospekt, sonevnda Kappastrukturin, sum liggur í basaltøki. Men hjá Amerada Hess og BP er støðan ein onnur. Tey hava eingi 9 ára loyvi at flyta sínar brunnar til. Og nettup tí verður samráðst. Sosialurin skilur, at BP og Anadarko, sum eigur eitt 9 ára loyvi á landgrunninum, hava tosað saman um at flyta BP brunnarnar inn á teirra øki og evnt. at bora ein basaltbrunn í staðin fyri tveir brunnar í Gullhorninum., nú ein slíkur verður nógv dýrari. Hetta er ikki váttað, og tí skal tað takast við fyrivarni. Tað ljóðar so eisini, at Amerada Hess skal hava víst áhuga fyri at flyta sín brunn inn á 9 ára loyvið hjá ENI. Tað hava vit heldur ikki fingið váttað.

Eftir øllum at døma er gongd á at fáa brunnarnar í Gullhorninum fluttar til 9 ára loyvini.